**ÍBÚÐ YNSKIST**
til leigu frá um. 1. mai til ikki roykjara.
Tlf. 316347

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Friðarligt fólk søkir íbúð í Havn.
Tlf. 224553 ella 351122

**GÓÐ SUMMARHÚS**
við Limfjørðin til leigu í tíðarskeiðnum 14. apríl til 14. juli og frá 11. august. (15 min. til miðbýin í Ålborg).
Tlf. 315813

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Stór íbúð til leigu. 4.500,- kr. + el og hita.
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn Bill.mrk. 104170

**STÓR ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Um tú vilt deila hana saman við øðrum.
Tlf. 213570

**TIL LEIGU Í TÓRSHAVN**
Kombinerað stova og kamar við atgongd til køk og bað, nærhendis handilsskúlanum, er til leigu til friðarligan ikki roykjara.
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn Bill. mrk. 10411

## Dýr

**HUNDAHVØLPAR**
Border Collie hundahvølpar, ein tík og tveir hundar, verða latnir.
Tlf. 361539, e. kl. 15

**LABRADORHVØLPAR**
til sølu. Kunnu latast um tvær vikur.
Tlf. 250939

**SKJALDBØKUR**
Tríggjar stórar skjaldbøkur til sølu.
Tlf. 441294 ella 442070 eftir kl. 17

**HUNDAHVØLPAR**
Sera fittir hundahvølpar latast djóravinum um fimm vikur.
Vælkomin at hyggja eftir teimum.
Tlf. 312155

## Fundir

**AÐALFUNDUR Í ROYN**
Ársaðalfundurin hjá Bóltfelagnum Royn verður í Roynhøllini ónskvøldið 14. mars kl. 19.00. Skrá eftir lógini.
Nevndin

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, hósdaign 8. mars kl. 19.00.
Guttorm Zachariasen fortelur.
Nevndin

## Húsarhaldstól

**TIL SØLU**
Eitt Zanussi køliskáp við lítlum frystirúmi, ein Figar frystiboks og ein Zanussi vaskimaskina.
Tlf. 313291

**TIL SØLU**
Brúktur Gorenje komfýrur til sølu.
Tlf. 212753

**TIL SØLU**
Ein el heitvatnstangi og ein Candy automatik vaskimaskina, 4 ára gomul, til sølu fyri sámuligan prís.
Tlf. 421576

## Innbúgv

**TIL SØLU**
Velour sofasett 3+2+1 til sølu fyri 1500 krónur. Teak hillasystem, 3 sektiónir, fyri 1000 krónur.
Tlf. 456033

**TIL SØLU**
Hvítt skrivaraborð við 3 skuffum, 150 kr, og boxmadrassa, 90x200, við náttborði.
Tlf. 316227

**TIL SØLU**
Stockholm sofasett, 3+2, fyri 6.500 kr. Næstan óbrúkt. Dupultsong, 180x200, við boxmadrassum og tveimum náttborðum, fyri 4.000 kr.
Tlf. 443325

**TIL SØLU**
Lenistólur, ið treingir til at polstrast um, til sølu fyri 500 kr. Hevur betrekk úr toyi.
Tlf. 312602

**3 MANS SOFA YNSKIST**
Helst úr leðuri, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 321617

**BOXMADRAS**
lítið brúkt boxmadras (140 x 200) bíliga til sølu.
Tlf. 313799

**SOFASETT**
3+1+1 brúnt sofasett og borð til sølu fyri 800 krónur.
Tlf. 455304

**BORÐ VIÐ STÓLUM**
Nýtt brúnt beisað indiskt borð við seks stólum er bíliga til sølu vegna plásstrot. Borðið er 190 x 200, nýprísur 9.000 kr.
Tlf. 318562 ella 314356 eftir kl. 15

## Pløgg

**KONFIRMATIÓNSKJÓLI**
std. 34, modell Lilly, til sølu.
Tlf. 316227

**FØROYSKUR**
mannfólkabúni til miðal stóran mann til sølu. Silvur og alt fylgir við.
Tlf. 373473

**LEÐURJAKKI**
Svartur leðurjakki str. 40/42, lítið brúktur, bíliga til sølu. Nýprísur 2.700 kr.
Tlf. 313799

**KONFIRMATIÓNS-SKÓGVAR**
bíliga til sølu, brúktir eina ferð, av merkinum Top-Man str. 40, svartir, nýprísur 800 kr.
Tlf. 313799

**GER KVETTIÐ!**
Tvinnar deiliga slitnar Levis til sølu fyri 200,- parið. 555/31/34 og 532/30/34.
Tlf. 311920 eftir kl. 18

## Sjavs

**FRÁ B36**
HM (Havnar meistaraheitið) í sjavs verður sunnudagin 11/03 í B36 húsinum kl. 1400. Kappast verður um stór steyp. Tekning á tlf:313769 eftir kl. 17.00.
B36

**ALMENN SJAVSKAPPING**
verður í Menningarfelagshølunum við Gøtugjógv, sunnudagin 11. mars kl.15. Kappast verður um steyp.
Gøtu Menningarfelag

**SJAVSKAPPING**
FM kapping í sjavs verður í Ítróttarhøllini í Runavík leygardagin 10. mars kl. 15.00. Tilmelding ikki neyðug. Føroya Shell stuðlar kappingini.
NSÍ og B68

**SJAVSKAPPING**
verður í LÍF-húsinum fríggjakvøldið 9. mars kl. 18.30. LÍF

## Súkklur

**YNSKIST**
Motorsúkkla ynskist til keyps.
Tlf. 220836

**YNSKIST TIL KEYPS**
Knallert ynskist til keyps, max. 3.000 kr.
Tlf. 316780 eftir kl. 16

**YNSKIST**
Suzuki knallert ynskist til keyps fyri 2000 kr. Skal kunna koyra, men tað bilar ikki, um hon treingir til ábøtur.
Tlf. 423551

**KONDISÚKKLA YNSKIST**
Kondisúkkla í góðum standi ynskist til keyps.
Tlf. 22 33 25

## Teldur

**TELDA TIL SØLU**
Pentium III 700MHz 256MB Ram 35GB Harðdisk (7200 rpm) 64MB DDR RAM grafikkort 40x cd-rom, 1.44MB disklastøð Webcamera 17" Skerm 10/100 Mbit netkort Eksternt modem Lexmark Z32 litprintari Windows Millenium og nógv onnur forrit. Kostnaður 13.000,-
Ring á tlf. 254124

**PC-SPØL TIL SØLU**
Deus Ex, Colin McRae Rally 2, Carmageddon 3, Soldier of Fortune og Messiah. Prísur um kr. 149-199,- pr. stk.
Tlf. 310441 og tab@post.olivant.fo

**YNSKIST TIL KEYPS**
Hevur tú hátalarar til eldu og/ella ein harddisk, ið tú vilt av við, so ring Tlf. 312602

**CREATIVE**
Web Cam 3USB til sølu fyri 250 kr., í góðum standi.
Tlf. 253950 ella 448220

## Tónleikur

**TIL SØLU**
Carlsbro GLX40 40 watts forstyrkjari. Lítið brúktur 2 ára gamal guitarforstyrkjari til sølu fyri 3100,-
Tlf. 448018 eftir kl. 18.00

**TIL SØLU**
Eitt 3 mánaðar gamalt Kenwood KDC 3080R bilstereo til sølu fyri einans 1400 krónur. Nýprísur 3200 krónur.
Tlf. 456428

**EL-BASSUR**
Ein 4-streingjaður Aria bassur við nýggjum Seymour Duncan mikrofonum til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 253319 ella 314618

**EL-GUITAR TIL SØLU**
við kassa. Ibanez, Roadstar II series v/ Humbucker mikrofon, árg. 84, í góðum standi, 3.600,- kr.
Tlf. 316027 lok. 405 eftir kl. 16

**PIONEER STEREOANLEGG**
Dolby digital surround forsterkari, cd-spælari við 6 fløgum minidisc og tveir stórir JBL hátalarar til sølu.
Tlf. 240346

**EIN SERA**
vælhildin 5-streingja banjo av slagnum Washburn til sølu fyri 3500 kr. Nýprísur: 5.500 kr.
Tlf. 252939

**EG SELJI**
eitt par av bongo trummum, tær eru Ø 20 cm. kr. 900,-. Eg tosi enskt.
Tlf. 252026

**ORGUL**
Viscount Pastorale DK-400. Til sølu.
12 ára gamalt, sera lítið brúkt. Hevur staðið væl alla tíðina. Pedalir í fullari longd. Bonkur. Nýprísur uml. 35.000,-. Ring, so finna vit ein hóskandi prís!
Tlf 442181

**EG HAVI**
danskar og útlendskar fløgur, bæði brúktar og óbrúktar. Eg leiti eftir føroyskum fløgum.
Tlf. +45 86428627
ella +45 26747474 fartlf.

## Út- & Sjónvarp

**LIMUM FELAGSINS**
verður bjóða á Tjalddurs Apotek týskvøldið 13. mars kl. 19 at hoyra um nýtt produkt til kroppin. Tilmelding er á tlf. 341100 Kristina, í seinasta lagi 9. mars.
Føroya Astma/Allergifelag

**DVD-SPÆLARI**
til sølu fyri 2300 kr. Tað er ein Nintaus og er kodufríur, spælur eisini MP3 fløgur. Hann er sum nýggjur.
Tlf. 253950 ella 448220

## Ymiskt

**TIL SØLU**
Ein Storno 6000 sendari við antennu og fýra metra kaðali til sølu fyri 1000 krónur. Møguleiki er at útvegað fleiri.
Tlf. 289020 - 456760

**KASTRUP-VÁGAR**
Einkult billet 10. mars til sølu fyri 500,- kr.
Tlf. 422364

**GSM TIL SØLU**
2 mðr. gomul Nokia 5110 telefon til sølu fyri 1.300 kr. ella hægsta boð yvir.
Tlf. 252345

**BANKIMASKINA**
til turt flak til sølu.
Tlf. 220756 - 371728

**YNSKIST**
Brúkt seymimaskina í góðum standi ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 441656

**FARTELEFON**
lítið brúkt Nokia NMT 450 fartelefon við vanligum og billøðara – nýtt battarí, til sølu fyri kr. 1.000,-
Tlf. 212904

**DAMUBORÐHALD**
Um nóg nógvar (min. 70) tekna seg, so verður árliga damuborðhaldið í VB-húsinum leygarkvøldið 10.3. kl. 20. X-Rays spæla til dans. Kostnaður borðhald + dansur: 150,- kr. Dansur: 100 kr. Tekningarlistar liggja á Báruni, Statoil og Shell. Seinasta freist at tekna seg er tórsdagin 8.3.

**TIL SØLU**
Ein modellbátur, 4-mannafar, gamalt føroyskt modell, og ein 4 mastra skonnart, modellskip.
Tlf. 313291

**TIL SØLU**
Gangi-/renniband við bandspælara, hevur display, ið vísir m.a. tíð, ferð og avstand, til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 320317, e. kl. 17

**FERÐAST SAMAN**
Eg fari úr Føroyum 14. mars og úr Keypmannahavn 19. mars.
Tlf. 319979

**SLØTT INNHURÐ**
við karmi, ið er 80 cm breiður, ynskist til keyps.
Tlf. 421518

**TIL SØLU**
Ein Nokia 32-10, 1/2 ára gomul, við tasku, headset, heimaladara og krom cover.
Tlf. 221589 - 317507

**MÁLNINGAR TIL SØLU**
Tveir málningar av Sigmundi Petersen til sølu fyri 3.000 kr. stk. 1. Kirkjubøur, Hestur, Koltur (1965). 2. Hoyvíkshólmur, Nólsoyggin (1964).
Tlf. 212065

**DUET CUP**
Suðringar og onnur áhugað! Innandura fótbóltskapping fyri børn og ung verður í Vágshøll 17. mars. Tilmelding áðrenn 12. mars á tlf. 374072 - 374600 - 373883.
VB-ungdómsnevndin

**MOTOROLA FARTELEFONIR**
3 X Motorola fartelefonir. 3 stk. Motorola CD 930 Dual-band GSM fartelefonir til sølu fyri kr. 400 pr.stk. Tlf. nr. (um dagin): 353213 Tlf. nr. (um kvøldið): 320014 E-post: RonnieH@fisk.fl.fo

**METALLDETEKTOR**
til sølu, til undirvatnsbrúk av merkinum »Garret« Sea-Hunter XL 500, amerik. Í sera góðum standi.
Tlf. 311512

**SLEPP AV VIÐ DELLURNAR**
Power Rider, ið er sera góður um ein brúkar hann, til sølu fyri 1.000 kr. Videoband fylgir við.
Tlf. 333988

**BÍLIGAN FERÐASEÐIL**
Fyri at fáa ein bíligan ferðaseðil sóknist eg eftir einum at ferðast saman við mær til Keypmannahavn tann 10. mars og uppaftur tann 25. mars.
Tlf. 444069

**FERÐAST SAMAN**
Eg fari úr Føroyum 23.3. og heimaftur 26. ella 27.3.
Ring 315867 eftir kl. 17

**NOKIA 3310**
til sølu, prísuppskot: 1500,-
Tlf. 252962

**YNSKIST**
Fitness/Ultra Toner við videobandi, fyri sámuligan prís, skal vera í góðum standi.
Tlf. 213193

**VINDEYGU**
2 vindeygu 70 x 120 cm til sølu fyri 200 kr. hvørt.
Tlf. 317528

**TRAPPA**
Lakerað fura, hálvt sving, 242 cm hæg, 90 cm breið, til sølu.
Tlf. 213571

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**
**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3128
**Navn:** Sp/f TN Bygging
**Adressa:** Heimistovuvegur, 625 Glyvrar
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 08.02.2001
**Viðtøkudato:** 08.02.2001
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 100.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Torben Nielsen, 625 Glyvrar.
**Stjórn:** Torben Nielsen, 625 Glyvrar.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2001 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka húsasmíð o.a. í hesum sambandi.
**Felagið** er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini

Skráseting Føroya tann 5. marts 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1362, **Sp/f Plan, 100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:** 12.09.2000.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Jóhannes Hellisdal, Smærugøta 9c, 100 Tórshavn (formaður), Helena Heidi Hellisdal, Smærugøta 9c, 100 Tórshavn og Rúna Franksdóttir Holm, Heiðagøta 2a, 160 Argir.
**Stjórn:**
Innkomin sum stjóri: Johannes Hellisdal, Smærugøta 9c, 100 Tórshavn.
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka maskinkoyring, handil, ídnað og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 5. marts 2001

Kristin Balle



## VIÐMERKINGAR

# Troyttur av trúttandi tjóðveldisfólki

**Tjóðveldisflokkurin vil ikki vita av, at tað eru tvinnir partar, ið samráðast. Nevniliga Danir og Føroyingar**

**Jógvan við Keldu**
*Samgongutingmaður*



Einki er at taka seg aftur í, at samgongan hevur í landsstýrismanninum við sjálvstýrismálum leingi havt ein trupulleika at dragast við. Hansara kós hevur ferð eftir ferð verið ein sigling í vandasjógvi, ella sum onkur hevur tikið til, at hann »enntá hevur fleiri ferðir siglt fulveldisskútuna á land«.

Tað er eitt undur, at ikki størri skaði er hendur.

Hetta hevur við tíðini gjørt, at samstarvið millum skipara og stýrimann er versnað.

### Høgni spælir solo

Hesaferð fór hesin óroyndi politikarin – eg vil ikki siga, at hann er ov ungur, men óroyndur – ov langt, og nú var løgmaður noyddur at steðga honum og seta hann »upp á pláss«. Vit finna okkum heilt einfalt ikki í hansara solospæli longur, og nú vóna vit, at hann og Tjóðveldisflokkurin skilja støðuna.

Tað stendur nú upp til teirra, um vit skulu sigra.

At vinna fullveldi krevur meira enn bara sjónleik og manipulatión. Seinastu árini hava ávís tjóðveldisfólk dyrkað hesi evni í so nógv.

Eg eri eisini troyttur av, at tað vísir seg hjá øllum flokkunum – her er einki undantak – at tað er umráðandi, »hvussu hann stendur seg«, ella hjá einkultum politikarum »hvussu teir standa seg«.

Spurningurin vit eiga at seta okkum er: »Hvussu standa Føroyar og føroya fólk seg«? Tað er veruligi spurningurin vit skulu seta okkum sum politikarar, valdir av fólkinum.

Hinvegin hevur Fólkaflokkurin ikki nóg væl dugað selt eina góða vøru. – Tað er munur á, hvussu fjølmiðlamaðurin Høgni Hoydal hevur duga at verið ein rættur sølumðaur.

Tað eydnaðist kanska eisini hesaferð Tjóðveldisflokkinum at gera hetta álvarsmálið til eina »procedure-bagatell« við tí »skeiva postberaranum«, og at fáa landsstýrismannin í sjálvstýrismálum at standa fyri fólkinum sum ein annan pínslavátt. Allur sjónleikurin á Vaglinum var settur upp til tað sama, og tað má sigast at vera meira enn heppi fyri »sjónleikin«, at tingfundurin kundi útsetast so leingi, meðan føroyingar allir vendu eyguni og oyruni móti Høgna Hoydal.

Sjálvandi átti løgmaður at koyrt Høgna Hoydal til hús beinanvegin

### Bíðaðu eftir Høgna

At billa fólki inn, at bíðað var eftir løgmanni, er heilt burturvið. Løgmaður hevði í góðari tíð boðað landsstýrismanninum frá, at tók hann ikki uppskotini aftur, varð hann loystur úr starvi, og løgmaður fór síðani at taka uppskotini aftur. Hetta uppsagnarbrævið var undirskrivað og víst Høgna Hoydal – kortini valdi hann at spæla sín egna leik og kanska fáa persónligan vinning av leiklutinum sum pínslaváttur.

Tá Høgni Hoydal tosar um, hvat umheimurin fer at siga nú, so vil eg svara, at føroyskur politikkur er álvarsamari enn sum so. Høgni hevur kanska sjálvur sett seg í eitt ávíst ljós hjá útlendingum. Um hann kann liva upp til tað, er hansara søk. Vit í Fólkaflokkinum arbeiða til frama fyri ta føroysku tjóðina – líka mikið hvat so aðrir halda.

Eg haldi eisini, at tað er rætt her at skoyta uppí, fyri at prógva vanvirðing tjóðveldisfloksins fyri løgmanni, at løgtingsmaður tjóðveldisfloksins Páll á Reynatúgvu á samgongufundi tók brævið frá Føroya løgmanni, har m.a. varð sagt, »at vit ynkja onga fólkaatkvøðu«, meðan samgongulimirnir høvdu eyguni fest á hann, rukkaði tað saman, gjørdi tað til ein »bólt«, og kastaði hann í krókin.

– Hetta er ov primitivt, og kann á ongan hátt góðtakast av Fólkaflokkinum.

### Eingin semja

Lat meg enn einaferð sláa fast, at full semja var ikki í landsstýrinum um fullveldisleistin, og tað var orsøkin til, at Løgmaður ikki vildi hava uppskotini niðan í Løgtingið. Hetta vitsti Høgni Hoydal og hinir tjóðveldismenninir, og teir vita eisini, at uppskotini ikki fara niðan uttan at full semja er um tey í landsstýrinum – at uppskotini hjá Høgna so heldur ikki bera juridiskt, sum onkur vil vera við, er ein onnur søga, sum bert styrkir okkara støðu.

Tjóðveldisflokkurin vil ikki vita av, at tað eru tvinnir partar, ið samráðast. Nevniliga Danir og Føroyingar. – Danir við síni stjórn og so gott sum øllum tí danska fólkatinginum og næstan helminginum av føroysku tingmanningini. Hetta er veruleiki, sum eingin kann renna frá, men takast í álvara.

Eiga vit ikki at minna okkum á úrslitið av fólkaatkvøðuni í 1946 og fylgjurnar av henni.

Lat meg undirstrika, at eg fegnist um, at vit funnu stevið aftur á hesum sinni, men tjóðveldismenn eiga at duga sær hógv i hesum týðandi samstarvinum um tað skal halda. Vit vilja tað besta fyri Føroya fólk. At okkara løgmaður og leiðari í landinum, sum leggur doyðin á júst hetta og ikki vil spæla hasard við framtíðini hjá Føroya fólki, skal verða spiltur út og vanvirdur av tjóðveldisfólki í teirra villa rúsi, er Fólkaflokkinum ovboðið.

Allur hesin sjónleikurin á Vaglinum við geylandi tjóðveldismonnum minti meg so nógv á læknastríðið í Klaksvík, sum tjóðveldisflokkurin avgjørt ongan heiður átti av, at tað varð loyst, men gjørdi sær dælt av hesum sorgarleiki.

Eg vil geva Helena Dam á Neystabø, formanni Sjálvstýrisfloksins rætt í, at samgongufloksarnir nú eru undir stórari ábyrgd at endur reisa álitið hjá føroyska fólkinum á samgonguna. Hetta kann bert gerast um Tjóðveldisflokkurin fæst at reka seriøsan politkkk, sum førir okkum fram móti endamálinum, vit hóast alt eru samdir um.

Tað tykist, sum teir hóvligu tjóðveldismenninir sleppa ikki at bera seg at sum góðir politikarar, teir verða riknir við einum putti, so allir fáast at ganga í gásagongd.

Eg eri troyttur av trúttandi tjóðveldisfólki.

## HEILSANIR



**Góða Irdi**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 28.2. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja vit uppi á**



**Góði elskaði Fróði Emil**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 5 ára degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Ynskja mamma, babba og Irena**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................
.........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .................................................................
Bústaður: ...........................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**